Stevna um kommunupolitikk

Hans Jørgensen, fyrrverandi kommunupolitikari:

– Gerið allar Føroyar til eina stórkommunu

– Eg skjóti upp, at vit skipa eina stórkommunu, sum eru allar Føroyar, t. v. s. Føroya landsstýri og tess stovnar og so hinar kommunurnar, sum eru tær smáu eindirnar umboðandi nærumhvørvið - tær kunnu vera 7, 10, 50 ella kanska 100, um tað skal vera, men uppgávuirnar skulu greitt definerast, sigur Hans Jørgensen, sum er fyrrverandi kommunupolitikari og fyrrverandi formaður í Føroya Kommunufelag



Mynd: Jens Kristian Vang

Hugleiðingar um kommunupolitikk

Leygardagin 2. november skipaði Javnaðarflokkurin fyri stevnu um kommunupolitikk. Stevnan varð hildin á Hotel Hafnia í Havn, og har vóru fólk úr øllum landinum komin saman at kjakast um kommunusamanleggin, kommunuskuld o. a., íð hevur við kommunubygnaðin at gera.

Fyrrapartin var evnið kommunubygnaðurin. Spurningurin var, um vit skulu leggja saman kommunur, ella vit skulu varðveita verandi skipanina. Hans Jørgensen, sum er fyrrverandi kommunupolitikari og fyrrverandi formaður í kommunufelagnum hevði eitt innlegg, har hann mælti til, at vit skipa kommunurnar øðrvísi - soleiðis at tær kostnaðarmiklastu og lógarkravdu uppgávurnar verða lagdar undir landið at umsita, meðan kommunurnar bert arbeiða við tí, sum tær beinleiðis hava ábyrgdina av.

Andreas Petersen, fyrrverandi landsstýrismaður mælti í sínum innleggi til, at vit skipa kommunurnar í størri eindir - ikki við samanlegging, men soleiðis, at skipaðar verða eindir ella regiónir, sum hava ábyrgdina av »tyngru økjunum«.

EIRIKUR LINDENSKOV

Hans Jørgensenm heldur, at kommunyuskipanin er ein vavgreytur av ringasta slag. – Minnist meg rætt, so fóru í 1980 umleið 60% av figgjarætlanini hjá Miðvágs kommunu til ymiskar lógasettar útreiðslur. hesum hevði fólkavalda kommunustírið í flestu førum eitki vald á. Við øðrum orðum álegði Miðvágs bygdarár umleið tveir triðingar ov nógv í skatti. Landskassin fór við hesum pengunum. Vit skulu minnast til, at skattarokningin frá kommunum er ikki javnað eftir inntøku, hon er ikki progressiv, m en 20% í kommunuskatti eru 20%.

Hans Jørgensen sigur, at hann haltið hevur hildið skipanina verið órætta. Hann heldur, at kommunalt stjálvstýri ein ein sera týdningarmikil táttur í fólkaræðisligu skipani. At nærsamfelagið eigur í enn størri mun at umsita og skipa tey øki, sum beinleiðis viðkoma livilíkindunum í nærumhvørvinum. .

– Setningurin »har vit gjalda, skulu vit eisini valda« skal aftur koma at galda fyri føroysku kommunurnar. Tí heldur hann, at vit eiga at broyta kommunuskipanina soleiðis, at týðiligur skilnaður verður gjørdur millum skyldur kommununna og landsins.

– Kommunurnar skulu taka tað inn í skatti, sum neyðugt er til at røkja uppgávurnar innan kommunumark ella kommunufelagsskap og landskassin tað, sum hann í mongum førum í dag áleggur kommununum at gjalda. Hetta heldur Hans Jørgensen vera greiða talu - Men hvør skal valda hvar, spyr hann og heldur fyri, at tað man fara at vera her møugligar ósemjur fara at stinga seg upp.

Hans Jørgenens er ikki samdur við landsstýrismannin í kommunumálum, sum so fegin vil leggja kommunur saman. Hann heldur, at tað verður vónleyst at finna eina skipan í fleiri eindum, sum setur allar landsins borgarar eins fyri lógini.

– Vit fáa ikki fleiri so stórar, náttúrligar eindir, at tað kann vera skilagott at leggja t. d. heilsuverk, almannaverk, skúlaverk út til tær at gjalda og umsita.

– Sum javnaðarfólk eru vit øll samd um, at tað skal ikki gerast munur á landsins borgarum, alt eftir, hvar í landinum teir valdu at búseta seg - stórt sæð -. – Eftir galdandi skipan er kanska ikki tann stóri munurin, burtursæð frá, at summir borgarar gjalda nógv meira í kommunuskatti enn aðrir.

– Eg komi til ta niðurstøðu, at í okkara samfelag er bara pláss fyri einari kommunu, tá vit hugsa um m. a. askúlamál, heilsumál og almannamál. Sundurbýting av hesum málum í smærri eindir fer abara at føra ójavna og umsitingarligar trupulleikar við sær. Tað verður ongantíð góður javnaðarpolitikkur, at t. d. almannaverkið í einum parti av landinum verður verri, enn í einum øðrum, ella at skúlaverkið hevur ymisk tilboð alt eftir, hvussu kommunan prioriterar ella orkar figgjarliga.

– Eg skjóti tí upp, at vit skipa eina stórkommunu, sum eru allar Aøroyar, tað vil siga Føroa Landsstýri og tess stovnar og so hinar kommunurnar, sum eru tær smáu eindirnar umboðandi nærumhvørvið - tær kunnu vera 7, 10, 50 ella kanska 100, um tað skal vera, men uppgávurnar skulu greitt definerast, sigur Hans Jørgensen.

Hann heldur, at tær smáu kommunurnar skulu røkja tær týdningarmestu seruppgávurnar, sum hoyra nærumhvørvinum til, og sum aðrar størri eindir ikki kunnu gera betur.

M. a.:

1. skipa kommununa teknist (vegir, kloakkir, vatnveiting, bytggi- og býarskipan o. a. t.)
2. byggja og halda havnir og lendingar
3. standa fyri mentanarvirksemi. Ítrótti v. m.
4. standa fyri, fyrireika ella taka lut saman við øðrum í vinnuskapandi virksemi í heimaumhvørvinum
5. møgulig onnur, sum eru gloymd í hesum umfari
6. álíkna kommunuskatt sambært figgjarætlan galdandi fyri omanfyri nevndu øki.

Afturat hesum skulu í nærumhvørvinum framvegis vera:

1. skúlanevnd (beinleiðis vald eftir fólkaskúlalógini)
2. barnavernd (vald sambært almannalógini)
3. líkningarnevnd (vald sambært skattalógini)
4. hegn- og vatnsýnisnevnd, umhvørvisnevnd, barndlið o. s. fr.
5. onkur, eg havi gloymt.

Fleiri øki í landinum eru lohgu farin saman at loysa mál í felag. Fyrst er at nevna SEV og IRF, sum eru felagskommunalir umboðandi meginpartin av landinum.

Kommunur eru gingnar saman um felags brandlið og -umsjón, heilsu- og umhvørvisvernd o. m. o. sum hgóskandi eru at samvinna um í eini nátúrligar størri eind.

– Hetta er nátúrlig og neyðug uppgáva hjá nærumhvørvinum at taka sær av. Tað er eisini givið, at hesi mál í flestum førum verða røkt betur í einum nátúrligum felagsskapi enn í sjálvdrátti. men slíkt nátúrligt samstarv fer óivað eisini í longdini at eggja til sjálvbodnar samanleggingar í størri kommunur.

– Alt annað, sum kommunur og land sambært galdandi lóggávu vevjast í, skal skipast sum landsuppgávur burturav og gjaldast úr landskassanum.

Og her nevnir Hans Jørgensen nøkur dømi:

1. skúlamál:
- bygging og rakstur av fólkaskúlum, kvøldskúlaskipanin, frítíðarundirvísing, musikkskúli, barnaansing o. a. t.

2. almannamál:
- almannaveitingar , eldrarøkt v. m.

3. heilsumál:
- øll heilsurøkt

4. samferðsla
- landsveganetið, samferðsla og innanlands og tað sum hartil hoyrir, eisini ferjulegur.

Hans Jørgensen leggur dent á, at hetta, hann hevur borið fram ikki er fullfíggjað, men hann vil á henda hátt vísa á eina aðra skipan, sum hann heldur fer at hóska betur.

– Tað slær óviað onkran, at t. d. skúlamál og almannamál verða tikin heilt frá kommununum. Í veruleikanum eru tey ikki tikin meira frá kommununum, enn tey longu eru. Tí sannleikin er, at kommunurnar hava so lítið annað við tey at gera, enn at gjalda lógasettar útreiðslur. Gaman í kann tða vera ymiskt, hvussu høgt kommunurnar raðfesta t. d. skúla ella barnaansing ella eldrarøkt. Men júst hesin munurin sigur mær, at vit javnaðarfólk ikki góðtaka, at summi fólk í okkara landi skulu vera øðrvísi fyri enn onnur, tí tær ymisku kommunurnar raðfesta so ymiskt ella als ikki hava figgjarliga orku til at hava sama sænastustøði.

Hans Jørgensen vísir at enda á, at hann ikki hevur tikið við trupulleikan við kommunuskuldini. – Men tað liggur í tí, at landskassin átekur sær fløgur og rakstur av fleiri uppgávum, sum kommunurnar nú partvíst gjalda. Við yvirtøkuna er vanligt at taka bæði við ogn og skuld. Óivað finst ein hóskandi loysn á tí spurninginum við.

At enda sigur hann, at øll kunnu í hvussu so er vera samd um, at skil má fáast á tí vavgreyti, sum í løtuni eyðkennir fløkjuna land/kommunur.



Mynd: Jens Kristian Vang

Fólk úr øllum landinum vóru komin saman hendan dagin at kjakast um kommunupolitikk. Hugsanirnar eru ymiskar um, hvussu vit best skipa kommunurnar. Hans Jørgensen hevur eitt boð upp á loysn, sum ikki hevur verið umrøtt alment.

Hans Jørgensen leggur upp til annan kommunubygjað